# Silberbauer játtar seg sekan


Michael Silberbauer játtar seg nú sekan í at verða tiknan fyri rúsdrekkakoyring í Føroyum
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Eftir mikla umtalu og trýst játtar 23 ára gamli FCK-leikarin Michael Silberbauer nú, at hann koyrdi rúsdrekkaávirkaður og varð tikin á løgreglustøðina í Tórshavn mikukvøldið í seinastu viku. Leiðslan í FC Keypmannahavn vil ikki gera stórvegis viðmerkingar**

RÚSDREKKA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Í týsdagssosialinum og á portalinum mánadagin bórust tíðindini fyri fyrstu ferð um 23 ára gamla Michael Silberbauer og hansara møguligu rúsdrekkakoyring í Havnini mikukvøldið, sum endaði við, at hann varð tikin á støðina, har lækni tók blóðroynd av manninum.

Eftir nógva umtalu í Danmark hevur Silberbauer nú játtað seg sekan yvirfyri tíðindamanni á danska dagblaðnum BT. Silberbauer greiðir frá, at hann varð tikin á løgreglustøðina at geva blóð, og at hann fór av støðini í Havn aftur skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

– Men eg havi framvegis mítt koyrikort, og tað plagar ein ikki at fáa aftur, um man er rúsdrekkaførari, sigur Silberbauer við BT og vísir tíðindamanninum koyrikortið. Men hetta er ikki rætt. Løgreglan upplýsir nevniliga, at skuldsettir rúsdrekkaførarar varðveita vanliga koyrikortið, til úrslitið av blóðroyndini fyriliggur, og tað tekur umleið tvær vikur.

– Eg geri ikki fleiri viðmerkingar, fyrrenn eg veit, hvat nú hendir, sigur 23 ára gamla FCK-leyvan.

### Fáorðað FCK-leiðsla

Longri uppi í FCK-hierarkinum er heldur ikki stórur áhugi at gera viðmerkingar til málið og møguligar avleiðingar fyri Silberbauer. Ítróttarstjórin í FC Keypmannahavn, Niels Christian Holmstrøm, sigur við BT, at Silberbauer hevur greitt teimum frá tilburðinum, hóast sami ítróttarstjóri so seint sum í gjár segði, at Silberbauer bert varð steðgaður, uttan at hann varð tikin.

– Tað er rætt, at ein blóðroynd varð tikin av Silberbauer í Tórshavn mikukvøldið, og annað havi eg ikki at siga, greiðir Holmstrøm frá. Spurdur, hví hann so í gjár segði, at Silberbauer stóð royndina og varð ikki tikin, gerst Holmstrøm ótolin.

– Nú skal tú ikki byrja at venda og snara tí, eg havi sagt. Silberbauer hevur drukkið tvær øl, blást í eina ballón og tikið eina blóðroynd, promillan hevur verið umleið 0,5, og longri er tann søgan ikki, sigur Niels Christian Holmstrøm.

Ítróttastjórin sigur, at tað er í ordan at drekka tvær øl, men tað er ikki í ordan at seta seg handan róðrið og fara út um lógarinnar karmar. Men Holmstrøm vil einki siga um avleiðingar fyri Silberbauer.

– Tit kunnu koma aftur um 2-3 vikur, tá úrslitið av blóðroyndini kemur, sigur Niels Christian Holmstrøm at enda.

### FAKTA

Michael Silberbauer er skuldsettur eftir føroyskari lóg, sum er nakað strangari samanborið við donsku lógina.

Umframt eina bót fær Silberbauer antin treytaðan ella treytaleysan dóm at missa koyrikortið.

Treytaður dómur (promilla omanfyri 0,5): Koyrikortið verður varðveitt treytað av, at førarin næstu trý árini ikki brýtur nakra ferðslulóg. Umframt hetta skal førarin standa koyriroynd innanfyri tríggjar mánaðir.

Treytaleysur dómur (promilla omanfyri 0,8): Førarin missir koyrikortið í minsta lagi seks mánaðir, hóast tíðarskeiðið kann vera væl longri, alt eftir hvat lógarbrot er framt. Síðani skal nýtt koyrikort takast bæði teoretiskt og praktiskt.

# Í Býin











# Í Býin














# Í Býin



















